# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

## Sosialurin á ferð

### BILLUND - barnabýur burturav

Í góðveðrinum á hvítusunnu var Sosialurin fimm dagar í Billund, har vit við barnabrillum og foreldraeygum upplivdu heimskenda legobýin. Fyrstu dagarnar gistu vit á Hotel Legoland og seinni á Hotel Propellen, sum er beint við. Heimanífrá leigaðu vit bil frá 62° N, sum stóð klárur á flogvøllinum í Billund. Ein dag koyrdu vit 20 minuttir norðureftir til Givskud Zoo, og ein annan dag tveir tímar suðureftir til Danfoss Universe á oynni Als. Men alt hetta kunnu tit lesa meira um hesa vikuna í Summarkappingini, har leiðin gongur til Billund.

# Danfoss Universe

Heimasíða:
www.danfoss-universe.dk

Næstsíðsta dagin koyrdu vit í einar tveir tímar suðureftir, til vit komu út á oynna Als. Har vitjaðu vit Danfoss Universe, sum er ein nýggj og stór upplivingarpark fyri børn og vaksin, sum dáma at spæla, granska, seta spurningar og finna svar – stutt sagt: eitt spælipláss innan náttúru og tøkni. Eyðsætt í hesum PISA-tíðum :-)

Danfoss fyritøkan, sum millum annað framleiðir hitastillarar til radiatorar, telist millum størstu fyritøkurnar í Danmark. Eftirsum talan er um eina fyritøku, ið fæst nógv við nattúruvísindi og tøkni, er tað eisini natúrligt at bjóða fólki at bólta sær á hesum spennandi øki.

Í Danfoss Universe ber til dømis til at kanna eftir, hvørjir av tínum átta intelligensunum eru teir sterkastu, umframt at royna teg við umleið 200 stuttligum avbjóðingum, eisini innan allarnýggjastu tøknina: teld, teknikk og alisfrøði. Vit høvdu í øllum førum ein framúrskarandi dag í Danfoss Universe, sum fær okkara bestu viðmæli.



*Bitland er eitt stórt spælipláss við øllum tí nýggjasta innan teldutøkni og talgilding, formiðlað á ein greiðan hátt, so at øll kunnu vera við – her á myndini við einari risastórari músakúlu...*



*Í Blue Cube møta vit sterku náttúrukreftunum. Til dømis einum eftirgjørdum jøkli, snarljósum, eldgosi og øðrum natúrligum undurverkum*



**Við einum Segway-akfari, er framtíðin tann reini gandur: Hellir tú teg framá, ekur tú fram – hellir tú teg afturá, bakkar tú. Við fyrstu Segway breytini í Europa, er Danfoss Universe fyrst við tí nýggjasta. Her ganga teldutøkni, sniðgeving og kropslig rørsla saman í eina hægri eind!**




sansir.fo

## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari